# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Minningarorð Johan Kristian Dam (vinurin) farin



Nú ein dagin, eg kom koyrandi millum Porkeri og Tvøroyri, ringdi telefonin hjá mær, tað var kona mín, sum segði at nú var vinur mín deyður. Tankarnir fóru beinanvegin til tað síðstu løtuna vit høvdu saman.

Tað var um jólini, eg frætti at Hanne var illa sjúkur. Eg segði við konuna at eg fari til Havnar í morgin at vitja hann. Fór so norður tíðliga morgunin eftir og beina leið út á Landssjúkrahúsið. Hitti har eina sjúkrasystir sum spurdi læknan, um tað var í lagi at eg fór inn. Tað var í lagi. Hanni var sera glaður um at síggja meg, og vit tosaðu um mangt og hvat, líka frá vit dugdu at ganga.

Øll skúlaárini og eisini aftaná skúlaárini vóru vit altíð saman. Tá vit vóru 17 ára gamlir, vóru vit útfyri einari syrgiligari hending, tað var tá ið torvbáturin gekk burtur. Vit gingu á keiuni, og bíðaðu til torvbáturin skuldi koma aftur, tí Herman beiggi Hanne var við, men tíðin bleiv so long, at vit fóru út í Porkerisnes við báti at leita, vit tonktu at teir kundu vera uppstøðgaðir, men lagnan var harðari enn so, teir komu ikki aftur á lívi.

Ja, Hanne og eg vóru bestu ungdómsvinir, men sum árini gingu og vit báðir fingu familju, bleiv tað longri ímillum at vit hittust, men nú kann eg siga at tann besta samrøðan vit nakrantíð hava havt, var tann síðsta samrøðan vit høvdu útí á Landssjúkrahúsinum, vit tosaðu um Jesus og vit bóðu saman, Hanne bað Jesus um fyrigeving fyri syndina og takkaði honum fyri blóðið, sum rann á Golgata og fyri frelsuna. So kom læknin og segði at nú mátti eg fara, men tá kundi eg fara glaður umborð á Smyril, tí tá visti eg, hvar Hanne fór.

Pápi Hanne, Johan í Billhúsi, var skipari við Morning Star, og pápi mín var motorpassari hjá honum, Johan hevði møtir umboð sunnudag og á einum møti tók pápi mín ímóti Jesusi sum sínum persónliga frelsara, júst sum Hanne gjørdi á Landssjúkrahúsinum.

Ja, saknurin er stórur hjá Ásu, børnum, abbabørnum og systkjum, men Harrin troysti og signi tykkum øll.

Friður verið við minninum um vinin Hanne.

**Erling**

## Heðin Mortensen seksti



Tann sjeynda apríl verður borgarstjóri í Tórshavn, Heðin Mortensen, seksti.

Hóast Heðin óiva fyri mong er ímyndin av einum Havnarmanni, so er hann av uppruna "Sunnanmaður". Hann er føddur á Tvøroyri, ella rættari, í Trongisvági. Foreldrini vóru Ethel Mortensen, fødd Jespersen, og Martin Eli Mortensen, bæði úr Trongisvági. Fyrsti barnaárini vaks Heðin upp í Trongisvági, men saman við foreldrum og eldru beiggjum sínum, Hans og Erhard, flutti hann sum smádrongur til Havnar og hevur hann búleikast her síðani.

Heðin er giftur Hjørdis Egholm Mortensen, dóttir Eriku og Alfred S. Egholm úr Tórshavn, og eiga Heðin og Hjørdis børnini Elin, Ann, Guðrun og Eirikur; av teimum býr bert Elin í Tórshavn meðan hini trý eru búsett í Danmark. Heðin sjey abbabørn.

Heðin er útbúgvin maskin- og bilmekanikari, og hann hevur eisini útbúgving sum bilsýnismaður og tryggingarmaður. Hann arbeiddi sum maskin- og bilmekanikari í 17 ár, men síðan 1978 hevur hann arbeitt sum tryggingarmaður hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Í nógv ár hevur Heðin verið virkin innan politikk. Bæði innan lands- og kommunallpolitikk. Hann sat sum løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin í Suðurstreymoyar valdømi 1998-2004, men hevur eisini verið varamaður á tingi í styttri tíðarskeið 1989, 1990, 1991, 1993 og 2004. Tað er tó serliga er tað innan býráðspolitikk at hann hevur gjørt vart við seg. Hann varð valdur á fyrsta sinni í býráðið fyri Uttanflokkalistan í desember 1972, og hevur síðani verið býráðslimur í Tórshavn uttan slit síðan 1973. Árini 1988-2004 fyri Sambandsflokkin, men eftir kommunuvalið í november 2004 hevur Heðin umboðað Javnaðarflokkin og hevur Heðin síðani 1. januar 2005 verið borgarstjóri.

Hóast Heðin hevur verið aktivur í bæði lokal- og landspolitikki og umframt hetta knýttur at ymsum mentanararbeiði, so hevur fremsta frítíðaráhugamálið hjá honum tó altíð verið ítróttin. Áhugin fevnir fleiri ítróttagreinar, men tað er serliga kappróðurin, ið Heðin hevur havt alsk til. Áðrenn hann í 1979 kom í stjórn ÍSF sum starvsnevndarskrivari, var hann eitt nú formaður í Havnar Róðrarfelag árini 1973 til 1979 og sat eisini sum formaður í Tórshavnar Ítróttarráð frá 1975 til 1978. Fyrsta mars 1980 gjørdist hann formaður fyri Ítróttasamband Føroya og nú hann fyllir seksti, hevur hann sitið sum formaður ÍSF í 26 ár.

Hesi árini Heðin hevur verið formaður í ÍSF eru stórar broytingar hendar innan føroyska ítrótt. Tá hann tók við vóru níggju ítróttagreinar umboðaðar í Ítróttasambandinum, meðan talið í dag er vaksið til 25, og eru hesar skipaðar í 15 ser- og deildarsambond. Eisini er talið av feløgum í formanstíð hansara økt úr 71 upp í 110 og eru í dag fleiri enn 15.000 íðkandi limir skrásettir í felagsskapinum.

Menningin innan ítróttina hevur hesi ár verið stór. Meira enn helmingurin av sersambondunum eru sjálvstøðugir limir í altjóða og millumtjóða ítróttasamgongum og hevur stórur dentur verið lagdur á at geva føroyingum høvi at vera við í millumlanda kappingum. Ítrótt er vorðin fastur partur av føroyska gerandisdegnum. Ítróttakappingar eru alt árið, og umstøðurnar at íðka ítrótt eru góðar og onkursvegna eru nærum allir føroyingar á einhvønn hátt knýttir at ítróttini.

Miðvísa arbeiðið, ið er gjørt innan Ítróttasambandið, sersambond og deildir, hevur borið ávøkst. Útbúgvingarætlanir hava havt støðuga menning við sær og bæði innan íðkan og fyriskipan er støðið høgt. Heimligar kappingar roynast góðar og spennandi og føroysk ítróttafólk luttaka javnan í millum- og altjóða kappingum. Møguleikar eru m.a. at taka lut í oyggjaleikum, smálandakappingum, kappingum um EM ella HM o.s.fr., so fyri tann, ið hevur hug og hegni er møguleiki fyri nógvum avbjóðingum. Nógv stig eru tikin og í nógvum førum er vunnið á mál, men framvegis eru nógvar avbjóðingar eftir. Eitt nú er limaskapurin í altjóða olympiska ráðnum IOC ikki vorðin veruleiki enn.

Fyri trúgva og drúgva virkið sítt innan ÍSF hevur Heðin fingið øll tey heiðursmerki, ið Ítróttasambandið gevur. Heðin hevur fingið silvur- og gullnál ÍSF umframt gullmerkið við bjálka. Eisini hevur hann fingið heiðurskross Ítróttasambandsins fyri arbeiði sítt til frama fyri føroysku ítróttafjøldina. Umframt hetta hevur hann fingið heiðurskross frá íslendska ítróttasambandinum og er eisini riddari av Dannebrog.

Starvsnevnd Ítróttasambandsins ynskir Heðin Mortensen hjartaliga tillukku nú hann fer um tey seksti í vónini um, at væl verður sjógvað og at byrur verður blíður í komandi tíðum.

Føðingardagin heldur Heðin við móttøku i Müllers Pakkhúsi mikudagin tann 5. apríl millum klokkan 15.30 og 19.00.

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt mintust og gleddu meg á 90 ára føðingardegnum 11. mars 2006, takki eg hjartaliga.

**Vinarligar heilsur**
**Karolina Poulsen**

**Dagurin í morgin**

**4. apríl. Ambrosius**, deyður í 397. Biskupur í Milano, verður nevndur sum ein av kirkjufedrunum.

Anna Maria Simonsen:

## 25-ára starvsdag hjá Tryggingarfelagnum Føroyum



1. apríl hevur Anna Maria Simonsen starvast í 25 hjá Tryggingarfelagnum Føroyum.

Anna Maria Simonsen er fødd og uppvaksin í Klaksvík, dóttir Helenu og Jóhan Simonsen.

Hon hevur altíð havt áhuga fyri politikki, og er tjóðveldisfólk burturav, eins og pápin, sum var tingmaður fyri tjóveldisflokkin.

Hon er gift við Edvard Nielsen, og eiga tey tveir dreingir, Bjarni 17 ár og Djóni 7 ár.

Anna Maria byrjaði sum næmingur á Føroya Vanlukkutrygging 1. apríl 1981, og var lærutíðin 3 ár. Frá 1. januar 1985 arbeiddi hon 1 ár á deildini hjá Tryggingarsambandinum Føroyar í Runavík.

1. januar 1886 byrjaði hon aftur á Vanlukkutryggingini, og í 1992 gjørdist hon skaðaviðgeri innan vanlukku, bæði á tí privata og lógarfesta økinum.

Hon hevur m.a. eisini verið rágevi hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum í samband við eina nýggja lóg um arbeiðskaða. Tá hon byrjaði í 1981 sat ein arbeiðsbólkur og arbeiddi við hesu lóggávuni, og hóast fleiri álit eru skrivað, er enn ikki komið á mál.

Tá deildirnar í Tryggingarsamtakinum løgdu saman í 1998 til Tryggingarfelagið Føroyar, varð hon vald í nevndina sum starvsfólkaumboð í eitt 4-ára skeið. Anna Maria hevur umframt nevndarsessin eisini virkað sum álitisfólk og sitið í samstarvsnevndini.

Tann 1. mars 1999 varð hon sett sum dagligur leiðari á persónskaðadeildini, og frá ár 2000 og til 2003 hevur hon arbeitt burturav við projektum til at menna okkara nýggju KT-skipan. Í januar í ár varð Anna Maria sett sum leiðari fyri eitt nýtt arbeiðsøki hjá felagnum, har arbeitt verður við at menna arbeiðsprocessir.